## Alexandur vónar

Hóast góðu byrjanina upp á kappingarárið, so er einki at ivast í, at tey á Skála høvdu ætlað sær ein breiðari hóp til besta mansliðið, enn tey hava í løtuni.

Enn hevur felagið ikki fingið spæliloyvini til teir tríggjar útlendingarnar, sum annars eru komnir til landið, og bara tað í sjálvum sær er sjálvandi dyggur smeitur.

Og hartil má liðið eisini vera tveir av vanliga føstu stuðlunum fyriuttan. Arnhold Berg meiddi sær krossbandið tíðliga í vár, og hann verður møguliga als ikki við í ár, og eisini Alexandur Johansen hevur drigist við skaða seinastu tíðina.

– Talan er um bruna í eini spong, og enn fái eg so slettis ikki vant saman við hinum.

Hvussu leingi roknar tú við tað fer at ganga, áðrenn tú aftur kanst hjálpa liðfeløgunum.

– Tað verður helst ein mánaður, áðrenn eg kann hugsa um at verja aftur. Vónin hjá mær er at vera við, tá vit í juni mánaði skulu spæla í inter-toto kappingini. Og skal tað ganga, so skal eg helst sleppa í gongd við veruliga bóltvenjing frá byrjanini av mai mánaði. So má eg bara royna at halda kropsligu venjingini við líka á annan hátt hesa tíðina, og so bara geva tol í aðrar mátar, staðfestur Alexandur Johansen.

-jm

Skála-ÍF 3-3 (2-1):

# Brakið livdi upp til nav




*Tað var alla tíðina nógv ferð á, og liðini bæði tóku og góvu í nærdystunum. Her er tað Gunnar Nielsen, sum verður tacklaður av Iulian Florescu*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Mongu áskoðararnir á Skála fingu ein fínan fótbóltsdyst við nógvum málum, tá tvey av fremstu liðunum í landinum sýndu, at stigatalvan ikki ræður um tilvild**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast veðrið ikki var av tí besta, so høvdu hópin av áskoðarum leitað sær til Skála, har oddadystur millum Skála og ÍF var á skránni. Tá tosað verður um fyrstudeildarfótbólt, so var talan her um heldur óvanliga støðu, men dysturin bar tó boð um, at hetta als ikki er av tilvild.

Tí hóast veðurgudarnir høvdu hug at arga, so fingu mongu áskoðararnir ein fínan fótbóltsdyst at síggja.

Ikki minst tí liðunum báðum dámar at spæla fótbólt. Bólturin varð fyri tað nógva hildin niðri á graslíkinum, heldur enn at verða sendur upp í vindin, og tí slapp veðrið ikki at arga so nógv, sum tað annars kundi gjørt.

### Ferðin í topp

Og frá fyrsta minutti var leikferðin høg. Skála hevði vindin undan fyrstu trý korterini, og tað tók teimum heldur ikki langa tíð at gera sær dælt av hesum. Fuglfirðingar høvdu tó ongan hug at gevast, og so stóð greitt, at talan skuldi verða um dyst við ferð, dramatikki og spenningi.

Og spenningurin helt sær allan vegin. Tríggjar ferðir vóru vertirnir á odda, men eins ofta javnaðu gestirnir. Eftir steðgin vóru tað fuglfiringarnir, sum høvdu vindin í bakið. Hetta gav eisini at bíta seinasta korterið ella so, tá teir trýstu fyri útjavnandi málinum. Bartal Eliasen, sum hesaferð var við frá byrjan, varð fluttur niðan í álopið, og so kundu fuglfirðingarnir av álvara byrja at senda bóltar innfyri frá kantunum. Júst hetta tykist vera stóra styrkin hjá liðnum í ár, og aftur hesaferð var tað úr hesum støðum, at málini komu.

Kanska er Skála verjan ikki tann hægsta í landinum, men tað er tankavekjandi, hvussu væl fuglfirðingarnir hava lagað spælið til hesa styrkina. Spælt verður fyri tað nógva upp eftir kantunum, so sendast kann innfyri, og eisini í deyðbóltum er liðið sera vandamikið.

### Framfýsnir skálamenn

Hjá Skála er styrkin aftur í ár ein hart arbeiðandi miðvøllur, sum støðugt leggur

## FAKTA UM DYSTIN

**Skála-ÍF 3-3 (2-1)**
1-0: Jónhard Frederiksberg, 6.
1-1: Pól Ennigarð, 11.
2-1: Bogi Gregersen, 28.
2-2: Høgni Zachariasen, 50.
3-2: Bogi Gregersen, 57.
3-3: Magni á Lakjuni, 87.
**Skála:** Eugen Voda – Bárður Danielsen, Pætur Dam Jacobsen, Rúni Rasmussen, Iulian Florescu – Bjarni Jørgensen, Nenad Stankovic, Pauli G. Hansen, Hanus Thorleifsson – Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen
**GK:** Hanus Thorleifsson, 5., Bjarni Jørgensen, 77.
**ÍF:** Allan Joensen (Emil Toftegaard, 39.) – Eyðolvur Petersen, Bartal Eliasen, Pól Ennigarð, Fritleif í Lambanum (Atli Petersen, 70.) – Hanus Eliasen, Símun Eliasen, Høgni Zachariasen, Rúni Elttør – Sylla D. Amed (Magni á Lakjuni, 53.), Gunnar Nielsen
**Dómari:** Oddmar Andreasen

## Málini

**1-0: Jónhard Frederiksberg, 6. min**
Skála spælir seg ígjøgnum í høgru. Fuglfirðingar vilja vera við, at talan er um rangstøðu, men hetta leggja hvørki Jónhard ella Skála í, tá sent verður innfyri.

**1-1: Poul Ennigarð, 11. min**
Hanus Eliasen sendir horna innfyri. Í fyrstu atløgu verður bólturin beindur burtur, men tá Hanus roynir aðru ferð, finnur hann skallan á Poul, sum ongar trupulleikar hevur at finna meskarnar.

**2-1: Bogi Gregersen, 28. min**
ÍF fær ikki ruddað bóltin burtur, og tá sent verður innfyri til ein leysan Boga Gregersen, fremur hesin dagsins detalju og saksasparkar bóltin í kassan.

**2-2: Høgni Zachariasen, 50. min**
Aftur er talan um deyðbólt. Hesaferð verður fríspark sent úr vinstru, og so er Høgni Z. enn einaferð hægstur.

**3-2: Bogi Gregersen, 57. min**
Eingin fuglfirðingur fær tikið Boga, sum einsamallur fer ígjøgnum verjuna, og tá málverjin kemur ímóti, verður bólturin lagdur framvið honum

**3-3: Magni á Lakjuni, 87. min**
Trýstið frá fuglfirðingum tóktist vera av, men tá Bartal leingir ein langan bólt, stendur Magni bráðliga púra blankur og fær sent í málið